## VB/Sumba dagur leygardagin

Leygardagin halda feløgini VB og Sumba føðingardagar sínar við hendingaríkum degi á Eiðinum í Vági. Samstarvið millum VB og Sumba í felagnum VB/Sumba tykist ganga væl og leygardagin er felags føðingardagstiltak. Byrjað verður við morginmati vesturi á Eiðinum í Vági frá klokkan 9 til 11. Klokkan 13 verður kynt í grillurnar og møguleiki er at grilla til klokkan 18. fólk hava sjálvi grillmat við, men møguleiki er at keypa drykkivørur. Lagt er upp til at her verður nakað fyri øll. M.a. hoppiborg, køkutombola, togtogan millum arbeiðspláss og sjálvandi eisini nakrir fótbóltsdystir. Allir limir hava ókeypis atgongd til 1. deildardystin við at vísa limakort. Um kvøldið verður skipað fyri kvøldsetu, har Robert McBirnie fer at syngja fyri. Okkurt verður eisini til matna. Fyrireikarnir biða fólk um at hava Føroya Fólks sangbók við til kvøldsetuna, sum byrjar kl. 19.30.

# Kostaði 30 dagar at smekka til ein politist

**Ein maður noyðist nú í fongsul eftir at hann gjørdust frá sær sjálvum í fyllskapi og sló ein politist í andlitið**

HARÐSKAPUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Tað kann vera dýrt at sláa fólk.

Men tað kann verða uppaftur dýrari at sláa ein politist.

Tað mátti ein maður staðfesta í Føroya rætti í morgun.

Hann noyðist nú í fongsul í 30 dagar fyri at hava sligið ein politist í andlitið.

Tað hevði onga ávirkan á revsingina, at hetta hendi í fyllskapi. Tað hjálpti heldur onki, at hann fortaldi, at tá ið hann varð komin til hús eftir hendingina, hevði hann stoytt níggju litrar av brennivíniði í vaskið. Tað var alt brennivínið, hann átti inni og síðani hevði hann ikki drukkið fyri ikki at koma í slíka støðu aftur.

Og Tað hjálpti heldur onki, at hann hevði eitt gott, fast starv, tí at sláa ein politist, sum roynir at útinna sítt arbeiði, sleppur ein ikki órevsaður frá.

Maðurin var ákærdur fyri at hava sligið ein politist í eyðkennisbúna í andlitið við knýttum neva. Hann var somuleiðis ákærdur fyri at herverk ímóti einum politibili, eftir at hann traðkaði rútin í aðrari bakhurðini ígjøgnum so at hann fór í knús.

Maðurin játtaði seg sekan í at hava brotið rútin í politibilinum, men hann mintist onki til at hava sligið

### Etandi skít

Tað var nýggjársaftan, at maðurin fór í býin og hann var blivin etandi skít.

Uttanfyri ein náttklubba í Havn elvdi hann til trupulleikar, tí tey vildi ikki hava hann inn.

Sjálvur helt hann, at tað kundi vera tí, at hann var ov skít.

Tey ringdu eftir løgregluni, tí hann hevði verið óláttaður við okkurt starvsfólk í náttklubbanum

Tá ið løgreglan kom á staðið, var tað onki, sum bendi á, at hetta skuldi enda í harðskapi.

Hinvegin eru hann og politisturin ikki samdir um, hvat síðani hendi.

Sjálvir ørminnist hann at tveir politistar komu og vildu hava hann í bilin, tí teir bjóðaðu sær at koyra hann til hús.

Hann fortaldi eisini politistunum, hvussu hann æt, men politistarnir vildu ikki svara, tá ið hann spurdi, hvussu teir itu.

Tá bleiv hann nasvísur og spurdu um teir báðir itu James, tí tað itu allir tænarar helt hann og sipaði til, at politistarnir høvdu bjóðað sær til at koyra hann heim.

Hetta hóvaði ikki politistunum báðum, tí teir svaraðu aftur, at teir høvdu annað at gera enn at koyra fyllibyttur heim.

Fínt, lat meg so sleppa út, svaraði maðurin. Men tá ið hann tók í hurðina, var hon læst.

### Og so gekk heilt galið.

Tað endaði við, at hann traðkaði rútin ígjøgnum og læt hurðina upp uttan í frá. Tí varð hann koyrdur í brummuna og sleptur út aftur dagin eftir.

### Fullkomiliga óvart á

Politisturin, sum varð sligin, greiddi frá, at tað kom fullkomiliga óvart á hann, tí tá ið teir tosaðu við mannin í fyrstuni, var hann hampiligur púra róligur og tað var onki, sum bendi á, at tað skuldi ganga galið.

Men hann var fullur, so báðir politistarnir tóku undir hvør sín arm á honum at styðja hann yvir til politibilin og hann fylgdi góðvilligur við.

Men tá ið annar politisturin so slepti arminum at lata hurðina á bilinum upp, reiggjaði hann brádliga og púra ómotiverað nevan og sló hin politistin inn á síðuna á andlitið.

Politisturin sá ikki slagið og hann sá tí heldur ikki, um tað var við knýttum neva. Men hann hevði so ongan skaða fingið uttan at hann kanska var eitt sindur groggy ta fyrstu løtuna at hann var eitt sindur eymur.

Tá komu fleiri politistar til og teir fingu lagt mannin í hondjørn, men hann varð fullkomiliga frá sær sjálvum og bardust alt hann orkaði fyri at sleppa leysur og tað helt hann fram við allan vegin á politistøðina.

Ákærin vísti á, at fyri nøkrum árum síðani var maðurin eisini dømdur 30 dagar í fongsul fyri harðskap og tí helt hann, at 30 dagar var eisini ein hóskandi revsing í hesum føri.

Verjin vísti á, at hin dómurin var so gamal, at tað vísti, at tað var ikki gerandiskostur at hann var so harðligur og helt ikki, at maðurin skuldi í fongsul, serliga tá ið hugsað verður um, at hann hevur fast starv og familju og at hann var givin at drekka.

Men dómarin gav fútanum rætt og trúði heldur politistinum enn tí ákærda. Tí var maðurin dømdur at sita í fongsli í 30 dagar, hóast hann ikki helt, at tað var prógvað, at politisturin varð sligin við knýttum neva.

Hann skal eisini betala 2630 krónur fyri bilrútin.

Maðurin tók við dóminum og so er hetta málið úti av verðini.




*Tað kostaði einum manni 30 dagar í fongsul at hann bleiv púra frá sær sjálvum eftir eina váttliga nátt í býnum og tað endaði við, at hann smekkaði til ein politist og breyt ein rút í politibilinum.*
*Savnsmynd*

# Fekk bót fyri at rópa eftir politisti

**Ein unglingi er drigin í rættin fyri at rópa ókvæmisorð eftir einum politisti**

ÓKVÆMISORÐ
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Tað er ólógligt at rópa ókvæmisorð eftir politistum.

Í morgun fekk ein ungur maður 1000 krónur í bót fyri at hava rópt ókvæmisorð eftir einum politisti ímeðan ein stór fjøld av fólki hoyrdi.

Tað var í góðari kenning, at maðurin gekk og dreivaði mitt á vegnum seint á kvøldið, so at bilarnir ikki fingu koyrt fyri honum.

Tá ið ein politistur á motorsúkklu kom á staðið í eini roynd at fáa hann inn á gongubreytina, gav hann framhjólinum á súkkluni eitt gypp.

Men tá ið politisturin so fortaldi honum, at hetta kostaði eina bót, bleiv hann í øðini og fór at rópa ókvæmisorð eftir politistinum.

“Fucking reyvarhol”, “fucking tøs” og “fucking idiot” vóru ókvæmisorð, sum politisturin mátti leggja oyra til.

Og tá ið hann so framvegis heldur ikki vildi flyta seg av vegnum, so at bilarnir fingu koyrt, varð hann lagdur í hondjørn og koyrdur í fullbrummu eina løtu.

Hann bleiv ákærdur fyri at rópa ókvæmisorð eftir einum politisti í eini mannamúgvu og fyri at hava órógva ferðsluna og tað kostaði honum 1000 krónur í bót.

Sjálvur vildi maðurin bara hava alt yvirstaðið, so hann tók við dóminum. Hann hevði verið fullur og býttur, sum tikið var til í rættinum og hann hevur heldur ongantíð áður verið í hóslagi við løgregluna.